Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Att.: Irena Nolsøe, fulltrúi**

**Tórshavn 16. november 2010**

Journal nr.: 10/00036-10
Viðgjørt: S.R:

**Avgerð um at veita váttan fyri at avtalan um Corporate Implant millum Heilsumálaráðið og Atlantic Airways ikki er fevnd av forboðnum í § 6, stk. 1 í kappingarlógini.**

Kappingareftirlitið hevur við gildið tann 16. november 2010 móttikið fráboðan frá Heilsumálaráðnum um avtalu við Atlantic Airways um Corporate Implant. Kappingareftirlitið hevur tann 16. november 2010 boðað Heilsumálaráðnum frá at fráboðanin er at meta sum fullfíggja sambært § 3, stk. 3 í reglugerð nr. 1 frá 10. januar 2008.

Heilsumálaráðið hevur í fráboðanini biðið um váttan fyri at avtalan ikki er fevnd av forboðnum í §6, stk. 1 í kappingarlógini, sbrt. § 9, stk. 1 í kappingarlógini.

Kappingareftirlitið hevur við heimild í § 3, stk. 1, 1. pkt. í kunngerð nr. 7 frá 13. mars 2008 tikið avgerð um at vátta at avtalan um Corporate Implant, sambært teimum viðurskiftum, ið Kappingarráðið hevur kunnleika til, ikki er fevnd av forboðnum í §6, stk. 1, og tí verður við hesum váttan sambært § 9, stk. 1 í kappingarlógini latin Heilsumálaráðnum.

Vegna Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
fulltrúi